# Frits Johannesen í Tilhaldinum í Havn

Fríggjadagin tann 27. juli kl 16:00. letur Frits Johannesen í Fuglafirði upp málningaframsýning í Tilhaldinum í Tórsgøtu í Havn. Málningarnir hanga uppi til sunnudagin 29.august. Opið er hesar dagar frá kl.16:00 - til kl. 20:00.



# Stórsigur til Erdogan og flokkin

Flokkurin hjá sitandi turkiska forsætisráðharranum Erdogan vann stórsigur á tjóðartingsvalinum í gjár. Tá 99,7 prosent av atkvøðunum vóru taldar upp lá flokkurin á odda við nærum 47 prosentum av atkvøðunum. Hetta gevur flokkinum 341 av teimun tilsamans 550 sessunum í tjóðartinginum, og tað er tvífalt so nógv, sum størsti andsstøðuflokkurin fær. Sekuleri vinstravendi Republikanski Fólkaflokkurin hevur fingið 21 prosent av atkvøðunum, og tann konservativi flokkurin MHP hevur fingið 14 prosent av atkvøðunum.

# Nýtt handilsøki lokkaði ellisakfar út í dagsljós




*Bilurin hjá Torstein Vilhelm var ein Mazda 929 Coupé frá 1977. Hann hevur staðið nærmast órørdur í bilhúsinum í Vági, síðani Torstein Vilhelm doyði í 1986*

*Mynd: Dagfinn Olsen*

**Í Vági er stór handilsætlan mitt í býnum. Har húsini hjá Torsteini Vilhelm eru, verður stórur handilsbygningur bygdur, men í bilhúsinum hevur gamal bilur staðið í eini 20 ár, men nú mátti hann út í ljósið, tí nýtt skal byggjast á økinum**

HANDIL OG ELLISAKFAR

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Húsini, sum eru kend sum húsini hjá Torstein Vilhelm í Vági, eru seld, og ætlanir eru um stóran handilsbygning á økinum. Tað eru Árni Brattaberg og Rakul Borg, ið hava ætlanir um handil á stóra økinum, ið liggur mitt í Vági. Tey hava nú keypt økið og hava ætlanir um stóran og stásiligan handilsbygning. Tey hava frammanundan handilsvirksemi í Vági.

Torstein Vilhelm var kendur handils- og vinnulívsmaður. Á stóra økinum er eisini eitt bilhús, og har hevur bilurin hjá Torsteini staðið inni at kalla uttan slit, síðani Torstein Vilhelm andaðist í 1986.

Sum ein gáta hevur bilhúsið staðið við høvuðsvegin í Vági, og flest øll hava vitað um bilin, sum stóð inni, men ikki øll hava sæð hann. Og mong hava bíðað spent, tí einaferð mátti tann dagur upprenna, at bilurin kom út í dagsljóð.

Talan er um ein hvítan Mazda 929. (Typan er LA2US). Bilurin er frá 1977 og var seinast til sýn í 2004 og slapp ígjøgnum uttan brek. Hann koyrir væl og sær væl út, burtursæð frá eitt sindur av yvirflaturusti, ið neyvan er ringur at fáa burtur.

Bilurin hevur bert koyrt 54.000 km og er sermerktur. M.a. hevur hann trygdarfetil og tað var ikki vanligt í bilum í Føroyum, fyrr enn mong ár eftir, at hesin bilurin kom til Føroya.

Bilurin hevur enn gomlu svørtu nummarspjøldrini.

Bilurin hevur verið úti onkran lítlan túr øll hesi ár, men tað undraði tó, at hann startaði beinanvegin, nú hann skuldi úr bilhúsinum, sum hevur verið karmur um ellisakfarið í mong ár.

Herfyri koyrdi ellisakfarið í Vági og vit fingu nakrar myndir á bryggjuni í Vági.

Nógvir bilar av hesum slag vóru í Føroyum fyri 20-25 árum síðani, og var bilurin eisini væl umtóktur millum ungfólk.



*Heldur sermerkt er tað, at bilurin hevði trygdarfetil, sum ikki var vanligt í sjeytiárunum. Ikki fyrr enn í 1986 var tað kravt, at bilar í Føroyum skuldu hava trygdarfetil. Tí var hetta "luxus" vanliga spart í bilum, innfluttir vórðu til Føroya*

*Mynd: Dagfinn Olsen*



*Húsini og bilskúrurin hjá Torstein Vilhelm í Vági. Á hesum stað verður stórur og stásiligur handilsbygningur bygdur*

*Mynd: Dagfinn Olsen*



Starv í Kaupthing Bank

Í sambandi við at virksemi okkara er munandi vaksið seinastu tíðina, sóknast vit eftir fólki til umsitingardeild okkara.

Við tilvísing til leiðaran á umsitingardeildini kemur tú at fáast við handfaran av skjalagongd í sambandi við virðisbrævahandlar, uttanlandssamskifti, alt vanligt bankavirksemi annars og aðrar fyrifallandi uppgávur.

Vit vænta, at tú ert fyrikomandi og hevur eitt positivt lyndi. Vit leggja stóran dent á, at okkara starvsfólk eru útvend og løtt at samstarva við.

Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi starv í einum livandi felagi, sum støðugt mennist.

Millum starvsfólkini valdar ein góður samstarvsandi í einum spennandi og mennandi umhvørvi.

Hevur tú okkurt at spyrja um í samband við starvið í Kaupthing Bank, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Regin I. Jakobsen, umsitingarstjóra, á telefon 351510 / 551510 ella telduposti regin@kaupthing.fo.
Til ber eisini at søkja starvið umvegis heimasíðuna.
Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 25. juli 2007.

Kaupthing Bank
Bókbindaragøta 8
Postboks 3090
FO-110 Tórshavn
www.kaupthing.fo

KAUPTHING BANK